# Agenda 21 stovan

## Ársfrágreiðing 2010

**Agenda 21 stovan**
Frammi í Gerði 1,
FO-340 Kvívík,
Tlf: (+298) 590766,
Fax: (+298) 421811,
T- postur: agenda@fkf.fo
Heimasíða: www.fkf.fo

# Agenda 21 Stovan

Agenda 21 stovan er sett á stovn sum verkætlan hjá Føroya Kommunufelag í 2004. Verkætlanin er partvís fíggja av Innlendismálaráðnum av játtanini til umhvørvisverndartiltøk.

Útgangsstøðið við verkætlanini í 2004 var at kanna um eftirspurningur var millum kommunurnar eftir einari skrivstovu at ráðgeva í málum um Agenda 21 og burðardygga menning. Tá kanningin vísti breiðan áhuga millum kommunurnar fyri verkætlanini varð hendan førd víðari frá 2005 við at skipa arbeiðið á Agenda 21 økinum í Føroyum.

Hetta er m.a. gjørt við:

- at skipa fyri kunning og ráðgeving um hvussu arbeiðast kann við burðardyggari menning.
- at geva kommununum konkret amboð í arbeiðinum við Agenda 21 og burðardyggari menning í Føroyum.
- at menna vitanina og arbeiðsgongdirnar á stovuni.

Sum framhald av tí arbeiði, sum er gjørt á stovuni undanfarin ár, er í 2010 arbeitt víðari við málsetninginum, at menna Agenda 21 økið og seta konkretar verkætlanir í gongd í komununum.

**Arbeiðsuppgávur í 2010**

Arbeiðsuppgávurnar á Agenda 21 stovuni verða í býttar á trý høvuðsarbeiðsøkir.

- Ráðgeving
- Kunningarátøk
- Luttøka í serstøkum verkætlanum

Hetta er umframt vanligu umsitingina á skrivstovuni.

Ráðgevingin er beinleiðis ráðgeving til kommunur o.o. í mun til konkret Agenda 21 tiltøk. Hendan verður veitt á fundum, um teldupost og telefon. Nýggi Agenda 21 ráðgevin byrjaði í apríl manaða og hevur brúkt nakað av tí at seta seg inn í tey mál framd eru og sum vóru sett í verk í 2009 og árini frammanundan. Samband er skipað við kommunur og Lokal Agenda 21 feløg og ætlanir lagdar til nakrar verkætlanir, ið skulu setast í verk í 2011.

Kunningarátøk hava verið í seinru helvt av árinum um agenda arbeiði og hvat liggur í hesum arbeiðnum. Økisfundur hevur verið fyriskipaður og framløga hevur verið fyri næmingum á framhaldsdeildum.

Serstakar verkætlanir eru innlendis- og millumtjóðaverkætlanir har stovan luttekur saman við og vegna kommunurnar. Nevnast kunnu t.d. “Fishing for Litter” og verkætlanin um verju av lívfrøðiligum margfeldi í kommununum, her við døminum frá Toftavatni, ið varð liðug í byrjan av 2010.
Onnur verkætlan tók seg upp í ár har evnið um skipaferðslu, trygd á sjónum og hóttan frá stórum dálkingarstøðum í Norðurhøvum varð lýst gjølliga frá føroyskari síðu í limaskapinum hjá Føroya Kommunufelag í KIMO-Kommunernes Internationale Miljøorganisation.




***Mynd 1.*** *Procentbýtið av arbeiðsuppgávum á Agenda 21 stovuni í 2010, býtt á høvuðsarbeiðsøkini.*

Verkætlanarparturin í 2010 fevnir í høvuðsheitum um Umhvørvisátakið og fleirtjóða verkætlanarsamstarvið við KIMO-felagsskapin og her umrøddu verkætlan um skipaferðslu í norðurhøvum v.m.

**Fundir í 2010**

Agenda 21 stovan skipaði fyri og tók lut á 23 fundum í 2010. Talan er um fundir og ráðstevnur sum í stóran mun hava verið fyriskipaðar av stovnum og umsiting landsins, meðan ein partur hevur verið í samband við verkætlanir og kommunur.

Við starvsfólkaskiftinum í apríl kom ávís broyting í fundarvirksemið í mun til árið 2009. Verður hugt at býtinum í fundarvirkseminum í 2010 sæst, á mynd 2, at helvtin av fundunum eru í samband við verkætlanir, ið mestan fevna um Umhvørvisátakið og fleirtjóða samstarvið við KIMO-felagsskapin.

Fundarvirksemið í samband við ráðgeving snýr seg mestan um samband til kommunur, einstaklingar og fyritøkur, og er hesin partur fyrireikaður at verða settur í verk í 2011.




***Mynd 2.*** *Procentbýtið av fundarvirkseminum á Agenda 21 stovuni í 2010, býtt á høvuðsarbeiðsøkir.*

## Virksemið á Agenda 21 økinum í 2010

Niðanfyri er stutt lýsing av virkseminum á stovuni í 2010. Meira kunning um ymsu verkætlanirnar fæst á heimasíðuni www.fkf.fo (trýst á Agenda 21) ella við at venda sær til stovuna.

## Almen átøk

**Grøna skjalið**

Í 2008 setti stovan, saman við kommununum, í gongd arbeiði, at orða felags yvirlýsing fyri arbeiðið við burðardyggari menning í kommununum, nevnd "Grøna skjalið".

Ætlanin við skjalinum er at skapa eitt felags grundarlag og nøkur felags prinsippir hjá kommununum, at byggja lokala Agenda 21 arbeiðið í kommununum á.

Allar kommunur kunnu gerast partur av skjalinum, ið kann lesast niður á heimasíðuni.

Skjalið var fyrst umrøtt av kommununum á verkstovu í 2008 og á kveikingardegnum í desember 2008 vóru kommunurnar kunnaðar um endaliga tekstin.

Í 2009 varð Grøna skjalið viðgjørt í kommunustýrunum har úrslitið bleiv at 16 kommunur í desember skrivaðu undir skjalið.

Høvuðsevnið í Grøna skjalinum er burðardygg menning í breiðum høpi. Slíkar menningar-ætlanir síggjast ikki í ítøkiligum úrslitum eftir stutta tí, og vil tað hava við sær, at nakað av tí gongur innan úrslit síggjast. Nakað er tó sett í verk og vísir seg so smátt at bera á rætta leið.

Tær kommunur, ið samtyktu Grøna skjalið eru hesar:

Eystur-, Fámjins-, Húsa-, Klaksvíkar-, Nes-, Porkeris-, Runavíkar-, Skálavíkar-, Sørvágs-, Sumbiar-, Sunda-, Tórshavnar-, Tvøroyrar-, Vága-, Vágs- og Vestmanna kommunur.

Ætlanin varð at fáa fleiri kommunur upp í Grøna skjalið í 2010, men heppnaðist hetta ikki vegna starvsfólkaskifti á Agenda 21 Stovuni har nýtt fólk tók við í apríl mánaða.
Løgd er ein fyrsta ætlan fyri 2011 har Agenda 21 Stovan hevur ítøkiligar ætlanir at bjóða fram burðardyggar menningarætlanir fyri kommunur og øki umboðandi fleiri kommunur. Grøna skjalið verður her eitt slag av megin arbeiðsætlan fyri kommunurnar, og verða tilboð nú eisini fyrireikað at fáa allar kommunur í landinum upp í Grøna skjalið.

**Lokal Agenda 21 arbeiðsbólkar.**

Í 2008 var Lokal Agenda 21 arbeiðsbólkur settur á stovn, har kommunurnar vóru bodnar at seta hvør sítt umboð í.

Ætlanin við arbeiðsbólkinum var at geva limunum atgongd til dagførda kunning um LA 21 økið og møguleikar, at møtast og samskifta við fólki, ið arbeiða við tí sama her og aðrastaðni.

Í 2009 hevði bólkurin tríggjar fundir runt um í kommununum: Á Tvøroyri í apríl (um Umhvørvisætlanir), í Vestmanna í mai (um náttúru og viðarplanting) og í Fuglafirði í oktober (í samstarv við Orkudepilin á Kambsdali, um alternativa orku).

Lokal Agenda 21 úrslit síggjast nú í fleiri kommunum har framhald er frá byrjanini í 2008.

Í Tvøroyrar kommunu verður støðugt arbeitt við fríðkan, gøtuskipanum og viðarplanting í Trongisvági.

Í Vestmanna kommunu, ið kann sigast at hava arbeitt miðvíst og sjálvstøðugt í fleiri ár innan fleiri burðardygg evni skipað kring skúlan, er nú víðkað um arbeiðsøki og lagdar ætlanir til grøna miðstaðaskipan fram við ánni og oman í fjøruna har neyst, fjøran og bátahylur verður savnandi depil í bygdini.

Orkudepilin á Kambsdali í Fuglafjarðar kommunu hevði ein steðg seinru helvt 2010, men er nú komin at virka aftur og hevur fingið avgreitt íbinding av sólorkuskipanini til skúlan.

Í Sandavágs kommunu varð Lokal Agenda 21 bólkur skipaður í 2008 at taka sær av umhvørvisætlan til gøtuskipanir og viðarplanting kring ánna frá fjøruni og niðan í dalin. Steðgur kom í tá kommunusamanlegging varð millum Sandavág og Miðvág til nýggju kommununa Vága kommuna. Agenda 21 Stovan fekk í 2010 áheitan at ráðgeva og leggja lag á til skipan ella endurstovnan av Lokal Agenda 21 bólkinum. Ein fyrsti kunnandi fundur hevur verið hildin, og verður nú løgd miðvís arbeiðsætlan til framhald og nýggj tiltøk.



*Vestmanna Kommuna skipaði 12.mai fyri kunningarfundi um tey arbeiðir framd eru í og kring skúlan og hvørjar ætlanir eru lagdar til víðkan oman gjøgnum bygdina og til fjøru.*

## Norðurlendskar kommunur í verkætlan um lívfrøðiligt margfeldi 2010.

Í 2008 bleiv Agenda 21 Stovan føroyskur tjóðarsamskipari í norðurlendska samstarvinum ímillum kommunur "Lokal medvirkning for at nå 2010 målet om å stanse tap af biologisk mangfold".

14 norðurlendskar kommunur hava í hesum sambandi luttikið í samstarvi, at deila arbeiðsroyndir í arbeiðnum at steðga minkini av lívfrøðiligum margfeldi. Kommunurnar hava hvør í sínum lagi arbeitt við ítøkiligum verkætlanum.

Í samstarv við Agenda 21 stovuna vóru Nes- og Runavíkar kommunur partar av samstarvinum um verkætlan at verja lívfrøðiliga margfeldið við Toftavatn.

Síðan 2008 hava umboð fyri luttakandi kommunurnar vitja í einari av kommununum eina ferð árliga, at deila arbeiðsroyndir og at kunna seg um ítøkilig átøk. Vitja varð í Danmark, Finnlandi og í Íslandi í september 2009 har 30 fólk úr 14 norðurlendskum kommunum vitjaðu Akureyrar- og Alftanes kommunur.



*Norðari partur av Toftavatni. Grøna strikan er ætlaða gøtuskipanin í alt 2,7km long.*

Norðurlendska verkætlanin endaði í 2010 og varð ein fundur hildin í stýringsbólkinum í Keypmannahavn í februar. Ætlan er at bólkurin skal hittast á norðurlendsku ráðstevnuni í Turku í Finlandi í byrjan februar 2011. Náttúrugripasavnið gjørdi kanning av lívfrøðilga margfeldinum við Toftavatn og fyriliggur nú frágreiðing frá kanningini. Verkætlanin varð løgd fram á almennum fundi á Náttúrugripasavninum 22. mai, ið varð endaliga framløgan til norðurlendsku verkætlanina til lívfrøðiliga margfeldisárið 2010.

**Lokal Agenda 21 í norðanlondum, kunningarferð.**
Lagt varð upp til at skipa kunningarferð til Álands fyri kommunustýrislimir frá 5-11.september at síggja hvussu lokal agenda 21 arbeiðir verða framd. Á ferðini vóru eisini fyrireikaðar vitjanir í nøkrum donskum kommunum. Tað vísti seg at blíva trupult hjá flestu kommunum at kunna fara á slíka kunningarferð, og bleiv tí avgjørt at leggja ein nýggjan túr tilrættis í 2011.

**SMALLEST.**
Fleirtjóðaverkætlanin SMALLEST, *Solutions for Micro generation that ALLow Energy Saving Technologies*, er stuðla av Northern Periphery programminum hjá ES. Fuglafjarðar Kommuna er, saman partnarum úr grannalondunum, partur í hesi verkætlan, sum koyrir yvir næstu 3 árini.
Endamálið við stóru verkætlanini er at skapa eina orkuráðgeving og skipa fyri undirvísing um varandi orku, ið er neyðug fyri at seta gongd á útbyggingina av varandi orku, serliga á smáum støðum.
Agenda 21 stovan luttekur frá 2009 í verkætlanini sum atknýttur partnari. Hetta merkir, at stovan fylgir við í tilgongdini og er við til at skipa fyri átøkum í Føroyum í samband við verkætlanina.
Orkudepilin á Kambsdali, sum verkætlanin nevnist hjá okkum, hevði ein steðg seinru helvt 2010, men er nú komin at virka aftur og hevur fingið avgreitt íbinding av sólorkuskipanini til skúlan.

**"Fishing for Litter" og skipaferðsla, vandastøður og havdálking í norðurhøvum.**
Agenda 21 Stovan er, í samstarv við Føroya kommunufelag og ígjøgnum felagsskapin KIMO (Kommunernes Internationale Miljøorganisation), í ferð við at seta í verk verkætlanina "Fishing for Litter" í Føroyum.

Verkætlanin gongur í stuttum út uppá, at fiskiskip, í okkara føri serliga trolarar á landleiðini, taka tað rusk, sum kemur í trolið við sær til lands. Skipini fáa serligar ruskposar við umborð at samla ruskið uppí og tá skipið kemur í havn er serlig bingja at lata ruskið í.

Endamálið við verkætlanini er at fáa tað rusk, sum verður fiskað upp úr havinum, við til lands. Harafturat er eisini eitt mál at kanna hvussu nógv rusk bátarnir á landgrunninum fáa í trolið og hvat slag av ruski hettar er.

Meira um "Fishing for Litter" verkætlanina sæst á heimasíðuni hjá KIMO, http://www.kimointernational.org/.

Í 2009 endaði ein royndarverkætlan í Tofta havn har trolarin M/T Búgvin legði ruskposar uppá land. Ein frágreiðing um royndarverkætlanina er tøk á stovuni.

Síðan hava úrslitini frá Tofta havn verið kunnaði út til kommunur, havnamyndugleikar, manninga- og reiðarafeløg og til almenningin. Málið er at kanna áhugan fyri einari fastari "Fishing for Litter" verkætlan í einari ella fleiri føroyskum havnum.
Verkætlanin á Toftum virkar enn tó at greining og lýsing av innsavnaða ruskinum ikki er liðug. Í 2010 var ætlanin annars at fáa aðrar kommunur upp í FFL – verkætlanina. Hetta heppnaðist ikki vegna tíðartrot á Agenda 21 Stovuni, men verður í 2011 miðvíst roynt at fáa nøkur av teim stóru fiskivinnuplássunum upp í verkætlanina. Á Toftum hevur verið hugsað um at fáa nøkur av ungu fólkunum á bústovninum fyri menningartarnað at taka sær av at telja og greina innihaldið í ruskposunum. Nýggir posar eru í framleiðslu í Vestmanna og klárir at taka í nýtslu.

Onnur verkætlan tók seg upp í sambandi við fundi hjá KIMO í Lerwick í maj har tað frá føroyskari síðu varð víst á eina økta skipaferðslu í norðurhøvum og við tí eisini eina økta hóttan frá vanda- og dálkingasrstøðum í havumhvørvinum. Heitt varð á føroysku umboðini at lýsa málið til aðalfundin hjá KIMO, ið varð hildin í Palanga í Litavia í oktober. Drúgv frágreiðing nevnd " North Atlantic and Arctic Sail Routes – with attention to marine environment, safety and rescue operations in the Faroe Islands regions", varð gjørd og við áheitan frá KIMO at leggja fram fundarsamtykt, ið seinri varð einmalt samtykt og síðan send til Føroya Landsstýri og donsku stjórnina. Frágreiðingin er síðan løgd fram fyri Løgmans-skrivstovuni, Uttanríkismálaráðnum og Innlendismálaráðnum.
Vandaevnið um øktu skipaferðsluna og dálkingarstøður í norðurhøvum og arktiska økinum vísir seg at vera sera aktuelt og er nógv umrøtt í norðurlendskum og europeiskum høpi.

**Umhvørvisátakið 2010**
Umhvørvisátakið er afturvendandi tiltak við 2 ára millumbili, og varð átakið skipað í 2010 við sama leisti sum undanfarin ár har høvuðsevnið í kappingini millum føroysku kommunurnar er Best røkta Bygd. Onnur evnið, ið fyrireikingarnevndin sett saman av umboðum frá Umhvørvisstovuni, Føroya Náttúruverndarfelag, Ferðavinnudeildini á Uttanríkismálaráðnum og Agenda 21 Stovuni, hevði tikið við í 2010 vóru Best røkta bygda- og varðagøta, Ársins grøni stovnur og so Besta átak. Føroya Fornminnissavn hevði ikki stundir at luttaka í fyrireikinginin í 2010, og mett varð ikki neyðugt at Arkitektafelag Føroya varð avjørdur luttakari.
Metingarnevndin vitjaði 9 kommunur fyrstu dagar í juni og kom skjótt fram til møguligar vinnarar til kappingarevnini. Besta átak varð evni, ið metingarnevndin sjálv gjørdi av, og varð sjálvsognarstovnurin Dugni kosin vinnari.

Tað vísir seg at verða somu kommunur sum hvørja ferð liggja frammalaga í kappingin til Best røktu Bygd. Hesum hava fyrireikarnir mett nakað skal gerast við til 2012 tá átakið aftur verður skipað. Vinnari varð Fámjins Kommuna og Tjørnuvík í Sunda Kommunu sum annar vinnari. Ársins grøni stovnur varð ikki við meira enn 3 luttakarum, og var eingin ivi, at Vestmanna Kommuna við skúlanum var greiður vinnari. Bygda- og varðagøturnar eru nógvar og væl skipaðar kring alt landið, og áttu fleiri enn einans tvær kommunur at verið meldaðar til luttøku.

Avdúkan og handan av virðislønum til vinnarar varð skipað í Perluni 24.juni við luttøku av Anniku Olsen, landsstýriskvinnu í umhvørvismálum, John Hestoy frá Føroya Prent, ið stuðlaði átakinum við prentlutum o.ø., og við Elin Lindenskov, býráðslimi og forkvinnu í umhvørvisdeilini hjá Tórshavnar Kommunu.
Átakið heppnaðist sera væl í allar mátar. Fyrireikingarnevndin hevur avgjørt at halda ein fyrsta fyrireikandi fund í august-september 2011 til átakið til 2012.

**Kunningarátøk**
Í mun til kunning hevur Agenda 21 stovan arbeitt á fleiri frontum í 2010.

- Heimasíðan, www.fkf.fo (trýst á Agenda 21), verður dagførd javnan við tíðindum um lokalar verkætlanir og kunningartilfari.

- Kunningarskriv um evnir og tiltøk í samband við Agenda 21 eru send kommunum við jøvnum millumbilum ígjøgnum árið. Frá norðurlendskari síðu, Norðurlandaráðnum, er í november útskriva kapping um bestu orkukommunu í norðanlondum. Freistin at lata inn uppskot er 20 januar 2011. Jarðfeingi samskipar verkætlanini í Føroyum og eru bæði Agenda 21 Stovan og Kommunusamskipan Føroya í arbeiðs- og fylgibólkinum hjá Jarðfeingi. Agenda 21 Stovan hevur heitt á einstaka kommunu at melda seg til luttøku og hevur boðið vegleiðing at seta umsókn upp.

- Føroya Kommunufelag skipaði fyri økisfundi fyri kommunurnar í Suðuroy hin 10.november. Her legði Agenda 21 Stovan fram um aðaltáttin í burðardyggari menning og við serstøkum atliti til Suðuroy. Víst varð m.a. til verandi lokal agenda 21 felagið á Tvøroyri, ið hevur fingið væl burturúr við gøtuskipanum og gróðurseting við Plantasjuna í Trongisvági. Famløgan er send til allar kommunurnar í Suðuroy, og verður í næstum – í februar 2011 - lagt upp til ítøkiligar burðardyggar verkætlanir í Suðuroy.

- Miðnámsskúlarnir kring landið skipaðu hin 11.november fyri Veðurlagsverkstovum, og varð Agenda 21 Stovan biðin at hava framløgu á Kambsdali. Her var fyrilestur í tveimum umførum við seinri bólkaarbeiði, og vóru næmingarnir sera áhugaðir og fingu væl burturúr. Tiltakið var sera gott og mennandi.

- Føroya Náttúrugripasavn skipaði fyri almennum fundi á setrinum hin 22.mai í samband við at 2010 av ST varð lýst sum altjóða lívfrøðiligt margfeldisár. Her legði Agenda 21 Stovan fram verkætlanarmøguleikan at skipa Hvannhaga í Suðuroy sum altjóða góðkendan tjóðgarð. Nógvir spurningar vóru á lofti, og varð áhugin millum luttakararnar stórur.

- Agenda 21 Stovan fylgir annars við evnum, ið rørast í samfelagnum og sum hava trægrir til burðardygd í breiðum høpi. M.a. er áheitan send til kosmetikkviðgerða at kanna nærri hvørji evnini eru, ið boðin verða fram til viðskiftafólk. Áheitan er komin til Agenda 21 Stovan at luttaka á fundi / skeið nevnt "Grøn Salong" har júst hárfríðkan og smyrsl er á breddanum.

- Áheitan kom til Agenda 21 Stovuna at stuðla undir at fáa sett forboð móti innfluttningi og sølu av eitri at halda ókrút og óynsktan vøkstur niðri. Talan er um evnini Glyphosat og Roundup, ið vísa eg at hava óheppin árin á plantu- og lívfrøði í jørð annars, og at álvasrom árin hava víst seg á fólk og húsdjór serstak í Argentina. Áheitan er send til Umhvørvisstovuna og Heilsufrøðiligu Starvsstovuna at kanna hetta mál nærri tá tað frá framleiðara verður upplýst at evnini avgjørt ikki mugu koma nærhendis vatni og frárenslum. Áheitan er frá Agenda 21 Stovuni til Umhvørvisstovuna at seta forboð í verk við ávísing til varsemisregluna, ið kann nýtast tá ivin skal koma náttúru og umhvørvinum til góðar.

**Luttøka á øðrum ráðstevnum og fundum**
Fyri at umboða kommunurnar, skapa kontaktir og at styrkja vangamyndina hjá Agenda 21 Stovuni verður luttikið á ráðstevnum bæði í Føroyum og uttanlands. Í 2009 luttók Agenda 21 Stovan á tveimum ráðstevnum/kunnandi fundum, *ARTEK Event 2009 "Tourist Cottages and Climate Change"*, Sisimiut í Grønlandi, í døgunum 11. – 13. august, og *Varandi orka í smásamfeløgum – at fáa gongd á*, Fuglafjørður, í døgunum 28. – 29. oktober. . Hendan altjóða ráðstevnan var fyriskipa av Orkudeplinum á Kambsdali og SMALLEST- verkætlanini. Agenda 21 stovan luttók m.a. við frágreiðing um Agenda 21 arbeiðið og orkusparing í kommununum.